# Tórshavnar kommuna bjóðar ungdómi arbeiði

**Býrt tú í Havn og hevur hug til at arbeiða í summar – ja, so er hetta avgjørt ein møguleiki. Aftur í ár skipar Tórshavnar kommuna fyri væl umtóktum ungdómsarbeiði til ung millum 14-17 ár.**

- Fyri at so nógv ung sum møguligt kunnu fáa kjansin at arbeiða, verður tað skipað soleiðis, at 10 arbeiðsdagar vera til hvønn. Tímalønin er hálv fyri tey, sum eru 14 ár, og tey 15 og 16 ára gomlu fáa 75% av vanligari tímaløn.

Arbeitt verður í bólkum, og verður ein leiðari fyri arbeiðsbólkarnar. Bólkarnir fara at arbeiða í ávísum býarpørtum kring býin og í bygdunum.

Arbeiðsuppgávurnar fevna um alt fyrifallandi, uppruddingar- og viðlíkahaldsarbeiði fram við vegum og úti í frílendum: at lúka, reinsa vegristir, sópa, mála, gera gøtur, reinsa grót upp o.s.fr., sigur Marjun Niclasen, samskiftisfólk hjá Tórshavnar kommunu



*Uppskrivingin til arbeiðið byrjar í dag, mikudagin 31. mai. Til ber at ringja til snarskivuna og melda seg til á tlf. 302017.*

## SOV Í SONGINI HJÁ RONALDO




Ein nátt í somu song, sum Ronaldo hevur sovið í, hevur størri virði enn ein nátt í seingini hjá Ronaldinho á Park Hotel Weggis í Schweiz. Ebay hevur seinastu vikuna selt hotelkømurini, sum Ronaldo, Kaka, Adriano, Roberto Carlos og Ronaldinho hava sovið í undir venjingarleguni í Schweiz. Ein nátt í somu song, sum Ronaldo júst hevur sovið í á Park Hotel Weggis í Schweiz, seldi best. Kamarið hjá Ronaldinho lá leingi á odda, men beint áðrenn sølan steðgaði, varð tað boðið 1.010,00 sveisiskir frankar – um 4800,00 krónur – fyri eina nátt á kamarinum hjá Ronaldo. Kamarið hjá Ronaldinho varð selt fyri 850 sveisiskir frankar.

Í alt fekk eBay 3200,00 sveisiskar frankar fyri søluna av kømurinum, og allir pengarnir fara vælgerðararbeiði í Brasilia. Vanliga kosta kømurini millum 480 og 780 sveisiskir frankar fyri eina nátt.

## BRITNEY SPEARS AFTUR STØK



Sambært www.kendte.dk er Britney Spears næstan aftur støk. Nógvir fjepparar eru óivað fegnir um hetta, men sjálv er Britney ikki glað fyri skilnaðin, tí so er hon jú skjótt einsamøll við tveimum børnum. Maðurin, Kevin Federline, er nevniliga fluttur niður í kjallaran í húsum teirra í California at búgva, og í miðlunum hava vit ikki sæð parið saman í ein heilan mánað, sum verður mett at verða rættiliga sjáldsamt. Sambært heimasíðuni er parlagið farið í spønir, men Britney roynir enn at fáa parlagið at rigga.

## MINST TIL FØTURNAR



Nú er stundin komin til at tveita ullintu hosurnar inn aftur í skápið og leita summarskógvarnar og sandálurnar fram aftur. Men áðrenn føturnar aftur skulu fram í ljósið er gott við eitt sindur av fótarøkt.

Tak eitt handklæði, fyll eina balju við heitum vatni, koyr eitt vet at grovum salti í, set teg í ein góðan stól, hvíl teg og lat føturnar njóta 15 minuttir í góðum vatni. Eftir hetta skal harða húðin skubbast av. Tak ein óbrúktan grÝtusvamp og skrubba deyðu húðina av. Skola føturnar og smyr tær í góðum kremi.

Voila – føturnar eru sum nÝggjar og klárar til summarið.

